

Mynd: Malan Tyril

**Tað byrjaði í 2003**

Sunneva greiður frá, at tá ið hon kom heim frá Roskilde Festival 2003, vóru fleiri av hennara vinfólkum farin undir at skipa fyri einum tónleikafestivali í Gøtu. Hetta helt Sunneva vera alt ov kul til at halda fingrarnar frá, og tískil bjóðaði hon seg til at hjálpa við fyrireikingunum. Hon fekk tá til uppgávu, at skula hava eina kiosk á festivaløkinum. "Síðan vant tað bara uppá seg", sigur Sunneva.

"Árið eftir tók eg mær av básum á økinum og í fjør stóð eg fyri allari søluni".

Sunneva búði í Íslandi, tá hon fekk starvið sum samskipari bjóðað. "Eg valdi at flyta heim, tí at hetta gjørdist eitt fulltíðarstarv. Eg flutti heim í februar, og síðan havi eg, saman við 4 øðrum, arbeitt við G! Festivalinum burturav. Vit vóru 5 fólk at byrja við, men hetta hevur vundið uppá seg. Nú eru vit eini 15 fólk, sum stríðast fyri, at alt skal verða klárt til tíðina. Tað er nógv sum enn liggur á láni, men hetta er alt dugnalig, kreativ og klók fólk sum eru við okkum, og tískil stúri eg als ikki fyri, at vit ikki verða klár til tíðina".

**Broyting í bygnaði**

Fyrr í ár varð G! skipað í eitt smápartafelag. Fyristøðumaðurin av smápartafelagnum er Jón Tyril. "Hóast tað hava verið bygnaðarbroytingar í G!, so er hetta ikki nakað, sum vit merkja serliga nógv til. Um vit merkja tað á nakran hátt, so er tað á ein positivan hátt. Nú verður tiltakið rikið nógv meiri professionelt, og hetta merkir, at vit hava betri sømdir at arbeiða undir. Hóast tað at byrja við vóru nøkur sum vóru ónøgd við, at G! varð umskipað, so haldi eg ikki, at tað er so løgi. Ymisk fólk hava ymiskar meiningar, men vit vilja bara tað besta fyri festivalin. Og at tað so gjørdist Jón Tyril sum bleiv fyristøðumaður, var bara gott. Vit hava øll álit á, at hann fer at bera festivalin víðari, í rætta andanum".

"Tað er altíð gott at arbeiða saman við Jón", sigur Sunneva. "Hann er loftar altíð bóltinum (sum hon málber seg), og hann setur altíð ting í verk. Jón er sera týdningarmikil fyri festivalin".

Tá ið vit spyrja hana um G! er ein ideologisk verkætlan, er Sunneva greið í sínum málið. "Vit í G! royna at skapa góðar karmar til føroyskan tónleik. Í so máta er G! ein ideologisk verkætlan. Men vit dríva hesa verkætlan meiri sum ein fyritøka. Vit eru noydd til at hava eina ávísa professionalismu í verkætlanini, tí annars fáa vit ikki alt at hanga saman. Vit syrgja fyri at fíggjarætlanin er so sterk og góð sum hon kann vera, soleiðis at vit áhaldandi kunnu skipað fyri Føroya feitasta tónleikartiltakið", greiður Sunneva frá.

Spurd um hvussu hon heldur at G! festivalurin verður í ár, ivast hon ikki. "Hann verður nógv tann feitasti festivalurin nakrantíð í Føroyum. Skráin er nógv betri enn í fjør, og karmarnir verða enn betri. So tað verður ordiliga feitt".

"Festivalurin verður ikki størri. Tað verða einans seld 5.000 atgongumerki. Vit meta ikki, at sandurin kann taka nógv meir enn 5.000 fólk, og tískil seta vit tað sum loft. Tað skal eisini verða hugnaligt á G! Festivali, og vit vilja ikki hava ov nógva trokan, tí so dettur hugnin burt", sigur Sunneva. Tó vil Sunneva ikki avvísa, at festivalurin einaferð í framtíðini verður útbygdur, men hetta fer tíðin at vísa.

Tað verða tó nakrar broytingar á G! í ár. Tey hava nú fingið loyvi at skeinkja á økinum, og hetta fegnast tey um norðuri í Gøtu. "Vit eru sera glað fyri tað, tí at nú kunnu vit sjálvi hava eftirlitið við tí. Av trygdarávum er ikki loyvi at hava fløskur inn við á festivaløki, og hetta hevur verið ein trupulleiki. Fólk royndi at smugla fløskur inn, og tað var ringt at hava eftirlit við øllum. Men hesum sleppa vit so undan í ár, tí at fólkið kann keypa sær tað sum teimum lystir inni á økinum. Sostatt noyðast vit ikki at stúra fyri brotnum fløskum o.s.fr.

Eisini fara tey at gera nógv meiri burturúr matsøluni á G! í ár, tí tey meta ikki at útboðið var nóg gott í fjør. "Har verður meiri í at velja", sigur Sunneva. Eisini sigur hon, at tjaldingaøki skal betrast munandi. Har ætla tey m.a. at øki skal verða betur upplýst.

**Tann største hendingin á G!**

Eitt sum er rættiliga merkisvert er, at Sunneva ongantíð sjálv hevur upplivað festivalinum. "Eg havi ongantíð havt stundir til at sæð allar konsertirnar, tí at tað alla tíð er okkurt, sum eg má taka mær av. Hetta er sjálvandi eitt sindur spell, men mítt arbeiði gevur mær nóg nógv í sær sjálvum".

Tá ið eg spyrji Sunnevu um, hvat hevur verið hennara størsta upplivilng á G!, ivast Sunneva eitt sindur. "Ehm...tað hevur helst verið í 2003. Sjálvt um eg ikki havi upplivað allar konsertirnar, so eru tað nógvar løtur, hinumegin borðið, sum hava verið stórar. Eitt nú tá ið Bomfunk MC´s komu inn í skrivstovuna fekk eg ein lítla hvøkk. Nústani tá skilti eg, at hetta kundi lata seg gera. Tað var ein sera stór løta hjá mær, og øllum hinum sum skipaðu fyri".

"Men annars hava tað verið nógvar sterkar løtur. Eitt nú tá ið eg sá limirnar í Kashmir koma spákandi oman eftir gøtuni; tað var eisini heilt fantastiskt", sigur Sunneva.

**Onki bar til**

Prátið fellur á tey mongu tilboðini, sum føroyingar hava í dag. Fyri fáum árum síðan ristu fólk við høvdinum, um ein royndi at fáa onkur stór tónleikanøvn til Føroyar at spæla. Men nú tykist onki óført.

"Tað er farin ein ótrúliga stór broyting fram. Og eg haldi at tann størsta broytingin er, at nú leggur man eina trygga og ordiliga fíggjarætlan, áðrenn fari verður undir eitt slíkt tiltak. Og fólk vóru so bangin fyri, at tað ikki skuldi lata seg gera, at hava fleiri tílík tiltøk, men hygg hvussu skilið er nú. Vit hava einar 5 festivalar sum klára seg, og hetta vísir eisini, at føroyingar hava tikið væl ímóti hesum tiltøkum", sigur Sunneva.

Tónleikavinnan er langt um leingi komin til Føroyar. Tónleikur er allastaðni. Fólk ganga við iPod og øðrum MP3 spælarum, og við tílíkum hentum tólum, er tónleikur vorðin meiri atkomuligur. Hetta merkir so víðari, at vit krevja meir. Vit vilja hava góðar og stórar konsertir her í Føroyum", greiður Sunneva frá.

**Eitt ár í senn**

"Eg veit slettis ikki hvar eg eri um eitt ár. Tá ið vit eru liðug við G! Festivalin í ár, ætli eg mær at ferðast ein túr til Íslands. Eg rokni ikki við at eg fari at flyta aftur til Íslands. Eg hugsi ikki ov langt fram um mína tilveru. Eg taki eitt ár í senn. Tað kann væl vera at eg haldi áfram arbeiða við G!, men um okkurt púra óvæntað og spennandi kemur framvið, so kann tað altíð verða at, ein broytir ætlan", sigur Sunneva.

"Tað kundi hent seg, at eg einaferð fari at útbúgva meg innan tónleikavinnuna, men enn havi eg onki avgjørt".

**At enda**

Men hvussu er við skránni? Er hon endaliga avdúkað? "Okkurt verður avdúkað afturat", sigur Sunneva.

Eg sigi við Sunnevu, at nógv meta at Kaizers Orchestra er rættiliga líkt Nephew í fjør – kunnu vit vænta nakað, sum fer at líkjast Europe? "Tað veit eg ikki...kanska", sigur hon, "Enn eru nøkur nøvn eftir at avdúkað", vísur hon á, og so mugu vit bara verða tolin...!